# Sjálvberandi búskapur

HERI MOHR



Týski rithøvundurin Günter Grass (1927) hevur skrivað fleiri skaldsøgur, teirra millum Blikktrumman (1959), sum gjørdi hann heimskendan. Fyri nøkrum árum síðani fekk hann nobelprísin í bókmentum. Hann og kona hansara hava búð á Møn í Danmark í mong ár.

Í einari samrøðu við rithøvundan Niels Barfoed (1931) sigur Günter Grass m.a., at um hann hevði verið føddur í, lat okkum siga, 1924 og harvið gjørt eina longri krígstænastu, er tað als ikki óhugsandi, at hann hevði verið drigin við í brotsgerðum. "Vit vóru jú øll indoktrinerað og fløskað við nazismu, sum vit trúðu uppá." Hansara virðing fyri Willy Brandt hevur støði í vanlukkuliga standinum, sum tók seg upp í Týsklandi. Tjúgu ára gamal visti hann (WB), hvat klokkan hevði sligið, og í 1933 tók hann avleiðingarnar av hesum og flýggjaði til Noregs. Hann fór til Svøríkis, tá Noreg varð hersett av týskarum í 1940. Sum kunnugt varð hann týskur kanslari í 1969 -74.

"Men hóast vit liva í eini aðrari verð, so eru vit nú í einum polstraðum rúmi, sum eitur demokrati.

Harrin lovi. Men tá ið eg líti kring meg og uppdagi, hvussu nógv tillaging og opportunisma her valdar, eitt nú í fjølmiðlum, men eisini í tí akademisku verðini, hvussu lítið skal til fyri at fáa fólk at hava seg undan, so spyrji eg meg sjálvan: Harragud, hvussu vildi tað gingið slíkum menniskjum í einum diktaturi?" – sigur Günter Grass kanska eitt sindur stúrin.

Tá ið ein meiriluti í løgtinginum í 2001 legði køvandi hond á blokkstuðulin, 615.5 milliónir, sum sundurliðar seg soleiðis: 613.9 milliónir lógarbundnar til Heilsuverkið og Almannaverkið og 1.6 mió. til Fiskirannsóknarstovuna, varð proklamerað, at hetta var neyðugt, um vit skuldu fáa sjálvberandi búskap í Føroyum.

Mær vitandi hava vit ongantíð fingið eina greiða frágreiðing um, hvussu sjálvberandi búskapur í Føroyum skal skiljast. Í skúlanum lærdu vit, at bert fá lond faa so mikið úr jørðini og havinum, at tey eru sjálvbjargin. At vera sjálvberandi ella sjálvbjargin man liggja rættiliga nær hvørjum øðrum. Tað hevði annars verið hóskandi og rímiligt, at hesir somu politikarar, sum taka so álvarslig stig í okkara almenna fíggjarheimi, greiddu okkum frá, hví ríkiskassans fígging av Almannaverkinum og Heilsuverkinum skal seigpínast, til tess at vit skulu fáa sjálvbering og frælsi í Føroyum.

Orðið sjálvberandi er annars ikki at finna í Føroysk Orðabók 1998 av góðum orsøkum. Tað var árið eftir, at hetta gandaorðið av álvara krøkti seg í politiska tungu í Føroyum..

Tá ið nú hendan búskaparliga sjálvberingin at ári er fingin frá hondum, fara vit øll til handils at keypa føroyskar radisur og føroysk egg og føroysk eplir og føroyskt slikkarí ikki um at tala.

Nú um dagarnar hevur ein almennur málstovnur kunngjørt, at í Føroyum muga vit ikki keypa seingjarlín o.tl. úr donskum príslistum. So er tann detaljan, hvat og hvar vit skulu keypa, sett upp á pláss. Gott at Buldog, Daels Varehus og Candor eru farin í søguna.

Sum kunnugt rindar ríkiskassin útreiðslurnar til dómsvaldið og politivaldið í Føroyum. Um nú fíggingin til hesi øki eisini varð komin í blokkskipanina 1. januar 1988 ella 1. juli 1993, er tað valla nakar, sum kann ímynda sær ruðuleikan, um fíggingin til lóg og ordan hevði verið djúpfryst á sama hátt sum fíggingin til vælferðina.

Ella tak nú ta føroysku fólkakirkjuna, sum í eini tvey ár hevur sveimað í leysari luft við ongum lógum. Hon er kanska vorðin sjálvberandi á einglahátt. Men hvussu kunnu kirkjan og prestar trívast í lógloysi, spyrja fólk við undran. Ella er tað bara kirkjan, ið er yvirtikin, og ikki hennara lógir?

So ber jú alt til, eitt nú at yvirtaka dómsvaldið við ongum lógum og politiið við ongum politistum.

Loysingarfólk – í fjølbroyttum politiskum búnum – hava í áravís tvíhildið, at danskur politikkur og danskur blokkur vóru orsøkirnar til, at Føroyar fóru á húsagang í oktober mánað 1992. Hetta er ein fatal skeiv diagnosa. Í 1993 hvurvu allar tær mongu løgtingslógirnar (við at kalla ongum kunngerðum og fyriskipanum) um almenn veðhald, stuðul, lán, upphøgging av skipum o.a. úr landskassanum. Tiltøk vórðu eisini sett í verk at byggja eina nýggja meginfyrisiting. Hetta: almenn veðhald, almennur stuðul, almenn útlán, almenn skipaupphøgging v.m. – og ein í 20 ár lívðandi niðurundirkomin politisk meginfyrisiting – var Ondets rod.

Blokkskipanin ella danskur politikkur áttu hvørki lut ella leik í ørskapinum.

Verður nú ein nýggjur Sesam-Sesam-politikkur, tá ið blokkurin er sópaður av borðinum og tveittur á bláman, lykilin til eitt Shangri-La í Føroyum?

Í løtuni ganga vit úti á eggini á nøkrum, sum líkist búskaparligari sjálvtýning av landskassanum, og tað fer at ráma vælferðina á øllum økjum og skuldarbinda landskassan við milliardalánum nógv ár fram í tíðina.

Sjálvgjørt er, í hesum føri, ikki vælgjørt.

Lesið annars sera góðu greinina hjá Sjúrða Skaale, løgtingsmanni, í Sosialinum nr. 112.

Ella er tað kanska dreymurin um eitt oljuklondike, sum órógvar okkara vanliga vit og skil?

Fyri 11 árum síðani uppstóð ein oljupsykosa úti í Tinganesi við einum oljumáláráði og -harra og øllum hartil hoyrandi. Men lítið spurdist burtur úr tí ævintýrinum. Nøkur fá ár (5) gingu, so hvurvu oljumálaráðið og -harrin sum sápublørur – við ongari olju. Sum ein avleiðing av hesari psykosu uppstóð um somu tíð eitt sjálvstýrismálaráð og -harri við øllum hartil hoyrandi. 4 ár gingu, áðrenn tað hvarv – eisini sum sápubløra. Hesin psykodeliski politikkurin kom í hæddina, tá menn í rama álvara og við fullum vilja fóru undir at tveita almennan pening í milliónatali fyri borð til óbótaligan skaða fyri vælferðina í Føroyum.

Eftir stóð (stendur) skattaborgarin, sum ikki eina ferð, gánandi við hárinum niður eftir nakkanum. Søgan hjá H. C. Andersen, Konan við eggunum, rennur okkum í huga.

Niðurstøðan av øllum hesum má vera, at nú ræður um, kanska meira enn nakrantíð, at fáa fótafesti á gomlum rókum og gøtum og síggja veruleikan í eyguni, og at tillaga gongu- og handalag hóskandi til andaligan og handaligan framburð og trivna. Umráðandi er tó í øllum førum at kenna okkara avmarkingar. So missa vit ikki fótafestið.

# Dan'skt málstrev

EYÐUN Á BORG
málreinsari



Góði Dan!

Takk fyri viðmerkingina! Hugaligt, ikki at verða burturtagdur!

Tú kanst ikki geva mær skyldina fyri, at næstan øll staðanøvn eru óbundin! Okkurt einstakt undantak er, treyðugt so. Av Argjum síggja vit Boðan og Borðuna.

Í Fuglafirði(num) hava tit eisini okkurt einstakt undantak, t.d. Borgina!! Stik den! Ups!

Annars eru staðanøvn óbundin: Blábjørg, Gjógvaráfjall, Kambsenni, Kambsdalur, Jøkladalur, Varmakelda, Slættafjall o.s.fr., o.s.fr.

VÍKAR (ikki VÍKS): Sterkt bend kvennkynsnavnorð hava ikki s-ending í hvørsfalli, eintali, men –ar!

Í Víkarbyrgi búgva víkarbyrgisfólk, ikki víksbyrgisfólk!

Í Vík búgva víkarfólk, ikki víksfólk!

Eg havi ikki gjørt hasar málreglurnar!

BLAMERA: Hatta orðið er ikki føroyskt! Í donsku-føroysku orðabókini (ikki hinari, tú veitst, kortini) stendur, at tað merkir : at gera sær fyri skommum, at skemma. Eg meini tað!

Tú fært tað næstan at ljóða, sum um eg geri málslig mistøk í míni málskriving.

Haraftrat biður tú meg gevast, men ikki vænti eg tað!

Spell, at so góður urtagarðsmaður sum tú ikki vilt koma inn í »okkara« málurtagarð at lúka »danismur«!

Máldálkingarleiðin gagnar ikki okkara viðbrekna móðurmáli!

E.S.: Heilsa hinum báðum í »foreiningini«!

*Við blíðari móðurmálskvøðu*
*Á Borg(ini) í summarsól 2009*

## Tíðargreinin

en, hvisDanmark dropper kronen og vælger euroen ? Eller som Høgni Høydal har formuleret det: "Vi bliver nødt til at tænke over, hvor interessant det er at være i periferien af et Danmark, der befinder sig i periferien af EU".

Det kan åbne for en langt bredere debat om Færøernes langsigtede placering. Én mulighed er naturligvis, Færøerne går ind i EU i fællesskab med Danmark. Den udvej vil en betydelig del af de færøske vælgere formentlig afvise fuldstændig. En anden mulighed er, at Færøerne fortsat presser på for at få selvstændige aftaler med EFTA/EØS. Heller ikke den vej er problemfri. For hvore meget EØS/EFTA er der tilbage, hvis Island skrider ? En skal uden meget indhold. En tredje mulighed er, at EU-debatten i Island pludselig åbner for en helt ny diskussion på Færøerne – nemlig om Færøerne bør bruge en optagelse i EU som grundlag for selvstændighed i forhold til Danmark. Eller sagt på anden måde: At Færøerne udtræder af rigsfællesskabet og i stedet søger optagelse i EU som selvstændig stat.

Det vil være en genvej, som løser nogle politiske problemer, men åbner for andre. Kan den frie republik Færøerne overhovedet blive medlem af EU? Kan man opnå aftaler, der er acceptable for færøsk erhvervsliv og vælgere? Kan landet med en befolkning på 50.000 bære et så omfattende, forpligtende internationalt samarbejde som EU-medlemskab ved siden af alle de andre opgaver, landet skal klare? Hvor økonomisk attraktivt vil det være – og hvor meget sikkerhed vil EU-medlemskabet give? Er der i virkeligheden noget nyt i forhold til dengang, Færøerne besluttede sig for ikke at indtræde i EF/EU sammen med Danmark? I mange år har EU ikke været noget særligt tema på Færøerne. Selv om holdningerne er lidt forskellige, har den generelle opfattelse været den, at EU som konstruktion ikke giver de små samfund nogle særlige fordele. Men udviklingen i EU er gået hurtigt – og igennem aftalerne mellem Færøerne og EU er der i dag skabt klarhed om end ikke tilfredshed på stort set alle de samhandelsmæssige områder. Men EU-samarbejdet er andet end handel. Taler vi personlig bevægelsesfrihed, tjenesteydelser, uddannelse, forskning og mange af de andre områder, som EU i dag giver allerhøjeste prioritet, står Færøerne udenfor. Vælger man som færing det rødbedefarvede, danske pas i stedet for det grønne færøske, vil man kunne opnå de samme fordele i EU som danske statsborgere – selv om det i virkeligheden er snyd. Og måske er det netop på disse felter, udfordringerne i de kommende år bliver størst.

Jeg er ikke i tvivl om, at fremsynede færøske politikere og andre samfundsengagerede i de kommende par år vil gå aktivt ind i en debat om, hvad der bedst tjener Færøernes langsigtede politiske, økonomiske, kulturelle og øvrige samfundsmæssige interesser. En forudsætning for at fastholde en stabil befolkningsudvikling, et ordentligt uddannelses- og erhvervsmiljø er naturligvis, at Færøerne kan holde på sine egne unge, og at det færøske samfund tilbyder sine borgere vilkår, der er fuldt på højde med det øvrige Europa.

Med Islands beslutning om at søge EU-medlemskab, er der pludselig en dimension i nordatlantisk politik, der fuldstændig har ændret perspektiv. Det afgørende bliver, hvordan færøske politikere og vælgere nu vil besvare den udfordring. At hævde at Islands EU-ansøgning "ikke flytter et komma" i færøsk politik er i hvert fald at lukke øjnene for den udvikling, der nu vil stille Færøerne over for store udfordringer.